## Salong Afrodite

Tey, ið ynskja sær
afro-flættur til summarið,
verða vinarliga biðin um
at bíleggja sær tíð
sum skjótast.

Avmarkað mongd

*Salong Afrodite*
Tlf. 458001


# Kvívíkar skúli

## søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7. árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarhøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 31. mai 2002 kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík


# Bilur við til sølu

Citroën Xantia Diesel til sølu

**Tlf. 213376 ella 447071**


# Fólk søkist

Søkt verður eftir einum formanni og trimum arbeiðsmonnum til jørðarbeiði á Skálafjørðinum.

**Sp/f J. K. H. Entreprenør**
tlf. 227255

# Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan so skjótt sum gjørligt. Talan er um eitt avloysarastarv til í fyrsta umfari 1. mars 2003.

**Uppgávan:**
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum, sum verða boðað til sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.

Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2002.

**BILEFTIRLIT FØROYA**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skrásetting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.

Gøtu Kommuna



# Gøtu skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/03.

Starvið er lýst leyst vegna økta tímakvotu.

Starvið er fulltíðarstarv, 26,5 tímar um vikuna.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 18.1. til 27.4.

Umsóknarfreistin er úti 23. mai kl. 16.00.

Um nærri upplýsingar ynskjast um starvið, ber til at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 441059.

**Gøtu Skúlastýri**
**v/ Mariu Gregersen, 513 Syðrugøta**

# søkir eftir einum skrivstovufólki

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
– At hava um hendi stovnsins skrivstovuarbeiði. Tað verður seg bókhald, lønir, flytingar, brævskriving, ymiskar skrásetingar og arkiveringar; eitt nú post, hagtøl, góðskumappur og eftirmetingar, og annað.

**Arbeiðstað**
Skrivstovan í Smiðjugerði, har nýtt virksemi teimum arbeiðstarnaðu at frama, er undir uppbyggjan.

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving og skrivstovuroyndir
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir

Bókhaldi verður ført í Lundanum. Lønir verða fluttar við Com-Data skipanini og flytingar avgreiddar um heimagreiðslu.

**Vit bjóða:**
- Spennandi uppbyggingar arbeiði, við atliti til at góðskustýra
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum

**Løn og setanartreytir:**
- Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólki
- Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
- Starvið verður at seta 1. august 2002, ella skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvi við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2002.**

Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj
Postboks 301
110 Tórshavn

**Viðmerk á brævbjálvan:**
**»umsókn skrivstovufólk«**

# Havnanevndin í Vági

*o*

*v* .

Øll, sum eiga gamlar bilar og annað órudd á Oyruni, í Líðini og á havnaøkinum á norðaru síðu í Vági, verða biðin um at taka tað burtur sum tey eiga, í seinasta lagið 7. juni 2002, annars verður tað ruddað burtur fyri eigarans rokning.

**Havnanevndin í Vági**

Sosialurin




# Tøkk

**Hjartans tøkk til tykkum mongu sum stuðlaðu Sambandsflokkin til løgtingsvalið**

**Ein serlig tøkk til tykkum 198 sum veittu mær so dyggan persónligan stuðul**



**Við hávirðing**

## Edva Joensen


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3357
Navn: Sp/f H.K.J. Byggivirki
Adressa: Box 40, 530 Fuglafjørður
Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna
Stovningardato: 04.05.2002
Viðtøkudato: 04.05.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Hervør Joensen, 530 Fuglafjørður.
Stjórn: Kristian Steingrim Joensen, Vestur í Bø, 530 Fuglafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 04.05.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er handverk, keyp og søla umframt aðra vinnu, ið stendur í samband við nevnda rakstur.

Skráseting Føroya tann 14. mai 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niÝanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3358
Navn: Sp/f PJ Entreprenørur
Adressa: Djúpagilsvegur 32, 188 Hoyvík
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 10.05.2002
ViÝtøkudato: 10.05.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Petur Jacobsen, Djúpagilsvegur 32, 188 Hoyvík.
Stjórn: Petur Jacobsen, Djúpagilsvegur 32, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: FelagiÝ verÝur bundiÝ viÝ undirskrift av einum stjóra. GrannskoÝari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 10.05.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka entreprenørvirksemi, keyp og sølu, útleigan og aÝra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. mai 2002

Kristin Balle


# Hósvíkar Skúli

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv at lesa uml. 23 tímar um vikuna skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 422259 ella 422525.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hin 28. mai 2002.

**Skúlastýrið fyri Hósvíkar Skúla**
v/ Adolf Johannessen
420 Hósvík









# *Samfelagsmøtir í Vági á Hvítusunnu*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjakvøldið | kl. 20.00 | Bønarmøti | í Betel |
| Leygardagin | kl. 16.00 | Uppbyggingarmøti | í Ítróttarhøllini |
| – | kl. 20.00 | Evangeliskt møti | – |
| 1. Hvítusunnudag | kl. 10.00 | Breyðbróting | – |
| – | kl. 16.00 | Uppbyggingarmøti | – |
| – | kl. 19.00 | Evangeliskt møti | – |
| 2. Hvítusunnudag | kl. 10.00 | Uppbyggingarmøti | – |
| – | kl. 15.00 | – | – |
| – | kl. 20.00 | Evangeliskt møti | í Betel |

Barnamøti í VB-húsinum:
1. Hvítusunnudag kl. 16.00

Opið hús verður í Betel:
Leygarkvøldið og 1. Hvítusunnudag kl. 22.00.

***Øll eru hjartaliga vælkomin***

***Samkoman í Betel***


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3359
Navn: P/F Perlan í SMS
Adressa: Á Trapputrøðni, Box 1059, 110 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 12.04.2002
Viðtøkudato: 12.04.2002
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant 500.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F SMS, á Trapputrøðni, Box 1059, 110 Tórshavn (P/F 207)
Nevnd: Christian Andreasen, Høvdagøta 6, 160 Argir (formaður), Niels Mortensen, Niðaragøta 100, 188 Hoyvík og Hans Mortensen, Dalavegur 50, 100 Tórshavn.
Stjórn: Niels Mortensen, Niðaragøta 100, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 12.04.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka matstovu, handil og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. mai 2002

Kristin Balle


## Ymisk sløkki- og neyðútgerð

- Brannslangir
- Koplingar & slanguhøvd
- Strálurør
- Slanguvognar
- Eldsløkkjarar
- Brannteppir
- Neyðrakettir
- Hondbluss

Sosialurin - 311820

*Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.*

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008


